


*Nýggi »oljulandsluturin« á Atlantsmótinum nærkast:*

# Føroyski landgrunnurin býttur í blokkar

*Nýtt kort er nú gjørt yvir føroyska landgrunnin. Hetta er fyrsta veruliga Føroyakortið í sambandi við eina møguliga komandi oljuvinnu. Allur landgrunnurin er býttur upp í sokallaðar blokkar, sum so seinni verða bjóðaðir út til oljufeløgini at gera boringar eftir olju og gassi í*

Jan Muller

Landsstýrið samtykti í gjár at geva oljufyrisitingini loyvi at brúka eitt nýtt kort yvir føroyska landgrunnin, har hesin er býttur upp í blokkar við eini komandi oljuvinnu fyri eygað.

Allur landgrunnurin er býttur upp í fleiri hundrað blokkar. Teir eru knappar 200 kvadratkilometrar hvør ella umleið 10,5 ferðir 18,5 kilometrar. Hvør "kvadratrútur" inniheldur 30 blokkar. Hetta er júst sama skipan sum á bretskum øki.

Martin Heinesen, leiðari á oljufyrisitingini sigur, at hetta er sjálvt grundarlagið fyri komandi oljuleitingunum undir Føroyum.

Slík kort verða rættiliga nógv brúkt av serstakliga oljufeløgunum og eisini almennum myndugleikum í sambandi við leiting eftir olju og gassi.

Talan er um eitt praktiskt amboð, har tú hevur lættari at kunna orientera seg á øllum landgrunninum.

Teir hava arbeitt við hesum kortinum í eina tíð. Næsta stigið er so at vita, hvørjir blokkar skulu bjóðast út til oljufeløgini.

Uppá fyrispurning hvussu teir ætla at bjóða blokkarnar út sigur Martin Heinesen, at tað er rættiliga ymiskt hvussu hetta verður gjørt frá landi til land. Danir og norðmenn hava t.d. brúkt hvør sín máta.

Nú fara vit í oljuráðleggingarnevndini at tosa um hetta málið og royna at finna út av at gera eitt tilmæli til landsstýrið um tey økini, sum skila best er at bjóða út.

Martin Heinesen sigur, at tað enn er ov tíðliga at siga nakað um, antin teir vilja mæla til at bjóða nakað ella alt út.

Tað finnast partar av føroyskum øki, sum enn eru trupl... at gera kanningar á og eisini partar sum eru sera djúpt hav.

Gjørt kortið fyri Oljufyrisitingina hevur Matrikulstovan í samstarvi við Landsverkfrøðingin og FLS.

Nú landsstýrið hevur góðkent kortið verður tað helst skjótt at hanga á veggjunum hjá flestu av heimsins størstu oljufeløgunum kring allan knøttin. Eftir Falklandsoyggjarnar, sum herfyri buðu út sínar fyrstu blokkar, eru føroyski landsgrunnurin tann nýggjasti at verða býttur upp í blokkar.

Hotel Føroyar
Tlf. 17500
Hotellið við útsýninum
HUGNAKVØLD
Leygarkv. 30. mars
við ORKESTURTREFFI
Orkesturtreff við luttøku av:
Driv, Twilight og Paula & Vinmonnum
Kostnaður kr. 50,-
Til matna verður:
• Fjølbroytt sjálvtøkuborð við føroyskum serréttum og mati úr føroyskum rávørum
Kostnaður kr. 150,-
Borð kann bíleggjast á tlf. 17500
Altíð vælkomin á
Hotel Føroyar
Tlf. 17500